

*Í dag gera skipini sjálvi drekkivatn. Men tá Johan var ungur varð farið undir ein foss. Presending varð løgd í bátin. So varð fylt í hann. Tað næsta var at tøma bátin við spannum og stoyta í vatntangan*

fínur kostur tá í tíðini. Kokkurin var reinligur, sum ikki var nøkur sjálvfylgja, sum umstøðurnar vóru tá umborð. Alt gekk jú fyri seg í lugarinum, har 15 av manningini búðu. So dugdi kokkurin eisini væl at kvøða og syngja.

Vit fingu ikki nógv hendan túrin, hóast vit veiddu víða. Vit fóru avstað síðst í februar og komu heim fyrst í mai. Veiðan var 400 skipppund. Eitt skipppund er 160 kg.

## Til Grønlands

So fóru vit til Grønlands og var hetta í juni mánaða. Tað var støðgað fitt millum túrarnar, so menn fingu møguleika at orðna eplir, torv og annað heimaarbeiði. Tað gjørdi eg eisini. Vit høvdu torv inni í Djúpagili í Hoyvíkshaganum, og her mátti alt húsfólkið hjálpa til.

Vit komu í eitt rættuligt ódnarveður á Kappanum. Øll míni ár á sjónum havi eg ongantíð sæð so stóran sjógv. Tað var vaktarskifti, og eg fór upp í kappan. Eg sá sjógvin, tað var sum at síggja eitt fjall. Eg sá, at sjógvurin gjørdi seg til at bróta. Eg kúvendi niður aftur í lugarið og segði monnunum frá. So skoraði eg meg fastan í gongini. Tað var ikki annað at gera enn at bíða. Tá tað brast, fóru menninir, sum sótu í koyggjuni á veg at tørna út, snøgt sagt flúgvandi í leysari luft tvørtur um alt lugarið yvir í leborð.

Tað eydnaðist at fáa lúkuna á kappanum fyri, so tað kom ikki stórvegis av sjógvi niður í lugarið. Tað var ein rættiligur hurlivasi, tá ein kom upp aftur á dekkið. Alt var brotið á dekkinum. Rútar vóru farnir í stýrihúsinum. Roykhanus var farin í kahúttini, og fossur stóð niður har. Menninir komu blásandi upp. Kabússan stóð og gløddi, tá ið sjógvurin kom niður, so tað var ein øgiligur dampur. Ættin var landnyrðinur eystan.

Hetta var mitt um summarið. Vit fingu ikki sjálvan sjógvin men bara skúmið av honum. Hann breyt áðrenn, hann náddi okkum. Tá var man lítil. Skipið var einki aftur í móti.

Aftaná tann dag havi eg havt stóra respekt fyri havinum.

Vit lógu bakk, men fóru so at sigla aftur, tá ið veðrið batnaði so frægt. Tá vit høvdu siglt nakað, kom eitt skip lensandi aftani frá. Tá var tað Elsa av Toftum, skipari var Matthias Jacobsen. Tað varð sagt, at hann plagdi at leggja nógv fyri. Hann kom koyrandi forbí okkum, men hann hevði eisini mist alt av dekkinum, tá ið hann kom í Føroyingahavnina. Matthias segði vanliga lítið, men hann var ein pressari.

Í Grønlandi royndu vit fyrst á Fylla Bank, so fóru vit norður eftir á Stóra Hellafiskabanka.

## Róðu við bátum

Vit róðu út við bátum og høvdu tveir bátar við umframt skipsbátarnar. Í brotinum vit fingu, vóru teir farnir fyri skjeyti.

Bátarnir vit róðu út við vóru fýra ella fimmannafør. Tað var strævið at fáa bátarnar út og inn. Tað var takkul, og so varð báturin hivaður upp. Alt mannskapið mátti vera við, so varð hann trýstur út um lúnningina. Har hekk hann, til skipið rullaði so mikið, so varð hann tveittur á sjógv. Tað var á sama hátt, tá báturin skuldi takast inn aftur. Hetta var tungt, tað var ikki altíð í góðum líkindum, men vit vóru nógvir menn.

Og so at síggja portugisararnar við doriunum! Tær blivu bara blakaðir á sjógv. Tær vóru jú settar saman sum sild í dós. Portugisararnir mistu ofta nógvar bátar, tí tað kom mjørki á teir, og teir funnu ikki móðurskipið aftur. Fleiri vóru tiknir upp av føroyskum skipum.

Vit royndu eisini við línu frá bátinum, men frá skipinum roynd vit við snøri. Teir roynd viðhvørt at royna við línu frá skipinum. Vit høvdu ikki línuspæl, tí mátti línan dragast við hond. Tað var øgiliga tungt. Tað var ein stórur og sterkur skálvíkingur Jenus, sum varð settur at draga. Vit prøvaðu eisini, men tað var ikki sum at siga tað. Tað var nógv lættari at draga línu frá báti. Vit settu línuna av bekki, sum vóru nýttir, áðrenn stamparnir komu.

## Flotfiskur

Í Grønlandi kundu vit eisini uppliva flotfisk beint undir vatnskorpuni. Hann var fiskaður við snøri. Tað vóru bert fáir favnar at draga, og tað var spennandi. Ta einu ferðina vóru vit í einum báti inni móti landi. Vit sóu á øllum skrápinum, at her var fiskur.

Báturin gjørdist skjótt fullur, hetta lítla fimmannafarið. Men tað vóru bert 90 fiskar. Teir vóru so ovurhonds stórir, og teir vóru nærum gjarvaksnir. Hetta var største fiskur, eg havi sæð. Báturin var søkklaðin.

Eina ferð var farmaskip komið í Føroyingahavnina, og allir vildu sleppa inn at fáa post. Skiparin vildi einki til tess. Hann vildi heldur hava fisk. Men líkamikið. Hendan leygardagin seinnapartin vit frættu, at skipið var komið í Føroyingahavnina, sóu vit flotfisk. Vit sigldu eftir skrápinum og her var nógv undir. Tá segði skiparin, at "fylla tit skipið nú, so skulu vit fara at sigla inn í kvøld". Tú kann ætla, at hvør maður dreiv á, so nógv hann kundi. Tá klokkan var 10 á kvøldi gav skiparin boð um at taka snørini inn. Tá lá hon borðfull. Tá var eisini farið at sigla.

Tað skuldi haldast heilagt, tá ið komið varð inn í sunnudag. Hvør maður fór beinanvegin at reinsa. Tað gekk eitt sindur inn í sunnunáttina, men hetta mátti gerast. Vit koma í Føroyingahavnina, her máttu vit sjálvir lossa fiskin umborð í damparan og taka salt eisini. Vit tóku proviant umborð, sum vit høvdu lagt upp, tá ið vit komu yvir.

## Menn vóru til sølu fyri bomm

Hvør maður fekk pakka heimani frá, og tað var spennandi, hvat ið var í pakkanum. Eg fekk millum annað eitt blikk av bommum, sum var sera forkunnugt. Eg trúi, at tað bara var mær, sum dámdi bomm, men tú kann trúgva nei. Eg fekk alt gjørt fyri bomm. Teir surraðu mær húkar, og teir gjørdu mær snørið klárt, bara teir fingu eitt bomm afturfyri.

Tað ringasta av øllum var oljuklæðini. Tey vóru ofta bara seymað úr mjølsekkjum, og so vóru tey ferniserað lag oman á lag. Tey skrædnaðu viðhvørt, men tey fekk mann eisini bøtt aftur fyri eitt bomm. Teir vóru óførir at seyma hesir gomlu. Hvør maður hevði nál og tráð við.



*Ein veldigur toskur*



*Tá ið snørini vóru drigin inn, var farið at flekja*

Oljuklæðini vóru gjørd heima. Ein kundu eisini keypa tey frá meiarínum. Jákup Weyhe, abbi skemtaran við sama navni, gjørdi oljuklæði umframt kryddaríir. Tað var jú nógv ymiskt virksemi hjá meiarínum. Har var eisini dampvaskaríið, og beint við var Weyhe.

Seinni, tá teir fluttu niðan á Háls, vórðu oljuklæðini gjørd har.

Tað bar eisini til at keypa útlendsk oljuklæði og sydvestar, men tað var so dýrt.

## Sigldu undan minum, sum ikki vóru

Meðan vit enn vóru har yviri, brast kríggið á fyrst í september 1939. Tað kom ein slík órógv á menninar. Summi skip fóru at sigla beinanvegin, men vit fóru so at sigla 12. september. Tá ið vit komu á Kappan fingu vit vestanvind. Motorurin varð steðgaður, tí tað var skjótari at sigla við seglum. Øll segl vóru sett til. Motorurin var ikki sett í gongd aftur fyrr enn líka vestan fyri Skúvoynna. Vit brúktu 12 samdøgur frá tí, vit fóru úr Føroyingahavnini, og til vit komu á Føroyar. Hetta var sera skjótt. Mann brúkti ikki olju, tá tað ikki tørvaði, og tað var meira behagilig sigling við berum seglum. Tá merkti man ordiliga, hvussu skipið livdi.

Kríggið var sum sagt byrjað, og tí vóru vit so ræddur fyri minum, hóast tær slett ikki vóru aktuellar so tíðliga. Hvørja ferð vit sóu okkurt á sjónum sigldu vit í einum